# Yvirlitstroling – landgrunnur

**Magnus Heinason, túrur nr. 2108 (sí túr 2110 fyri endalig úrslit)**
**Tíðarskeið: 17/2-3/3 2021**
**Ábyrgd:** Petur Steingrund

**Endamál:** *Høvuðsendamálið við túrinum er at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu, longu, gulllaksi og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skal vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið verða veidd. Eisini skulu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa og øðrum fiskasløgum.*



---

### Samandráttur

Tilsamans 58 støðir vórðu tiknar og av teimum vóru 55 góðkendar. Hetta var eystan- og norðan fyri Føroyar. Nøgdirnar av fiski og aðrari veiðu eru vístar í Talvu 1, men víst verður til túrfrágreiðingina fyri túr 2110, har úrslitini fyri allar 100 støðirnar eru tøk. Tó kann nevnast, at tað var lítið til av nebbasild, men nakað av lodnu. Tað kom eisini fyri, at fiskurin át yngul av gulllaksi. Vit fingu ein merktan tosk aftur.

### Um túrin

Vit fóru av Havnini hóskvøldið kl. 21:10. Byrjaðu at taka støðir á Sandoyarbanka og tók støðir í øllum økinum eystan- og norðan fyri Føroyar (sí kort). Veðrið var heldur vánaligt og ein dag lógu vit bakk. Komu inn mikumorgunin kl. 11.

### Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri.

### Reiðskapur

Kassatrol við 40 mm meskavídd í posanum, rockhopper grunnur, 60 og 120 m breitlar og Steinsham-lemmar. Miniloggarar.

### Viðmerkingar

Tað nýggja rannsóknarskipið, Jákup Sverri, tóvaði 21 hál við síðuna av Magnusi Heinasyni. Hetta var fyri at fáa tilfar til vega, har skipini kundu samanberast.

Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar og í fílin Tur2108d.docx.

### Fólk við frá Havstovuni

Petur Steingrund (kanningarleiðari)
Durita Sørensen, Marit Pedersen og Jens Arni Thomassen

*Talva 1. Veiða, nytrur og magar pr. fiskaslag.*

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar |
|---|---|---|---|
| HÝSA | 14196,212 | 496 | 175 |
| UPSI | 5804,482 | 513 | 121 |
| TOSKUR | 3686,587 | 515 | 146 |
| GULLLAKSUR | 2112,445 | 125 | |
| LITLI KONGAFISKUR | 1384,915 | | |
| SVARTKJAFTUR | 1131,964 | 21 | |
| LONGA | 1042,453 | 152 | 4 |
| HVITINGSBRODIR | 1038,532 | | |
| HVITINGUR | 853,944 | | |
| REYDSPROEKA | 429,811 | 3 | 3 |
| STORI KONGAFISKUR | 367,492 | | |
| TUNGA | 303,247 | | |
| BLALONGA | 254,159 | 37 | 5 |
| KNURRHANI | 160,574 | | |
| HAVMUS | 100,169 | | |
| ROGNKELSI | 96,246 | | |
| HAVTASKA | 84,750 | | |
| BROSMA | 81,464 | 52 | 1 |
| SILD | 64,410 | | |
| SANDSPROEKA (LL) | 54,702 | | |
| LYRUR | 51,095 | | |
| SILVUR MURTUR | 50,732 | | |
| MATHØGGUSLOKKUR | 36,341 | | |
| HVASSASPREK | 22,197 | | |
| IGULKER ECHINIDAE | 21,398 | | |
| TINDASKØTA | 16,787 | | |
| STEINBITUR | 14,835 | | |
| GAMAL FISKUR | 12,217 | | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 7,502 | | |
| KALVI | 7,350 | | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 6,528 | | |
| JAKUPSSKEL | 4,572 | | |
| KROSSFISKUR ASTERIIDAE | 4,380 | | |
| SKRAMBUL | 4,050 | | |
| HVALSPYGGJ | 3,862 | | |
| TRAELSRASSUR HOLOTHUROIDEA | 3,574 | | |
| GLYSUFISKUR | 2,495 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 2,108 | | |
| SJONOTA | 1,502 | | |
| ULVFISKUR | 1,165 | | |
| ØDA(DEYD) | 1,158 | | |
| KORALL LOPHELIA | 0,795 | | |
| IGULKER PURPUR | 0,703 | | |
| KUPUSKEL(DEYD) | 0,521 | | |
| LODNA | 0,426 | | |
| GAGGUKRABBI P BERNHARDUS | 0,399 | | |
| MAKRELUR | 0,320 | | |
| SJOSOL SOLASTERIIDAE | 0,264 | | |
| GAGGA | 0,261 | | |
| GAGGUKRABBI P PUBESCENS | 0,238 | | |
| NEBBASILD | 0,182 | | |
| SVAMPUR | 0,150 | | |
| TILSAMANS | 33528,665 | 1914 | 455 |